# Samgongan slitnar áðrenn valskeiðið er úti

**Kári Højgaard, sum sjálvur er í samgongu, hevur ikki stórar vónir um framtíðina hjá samgonguni. Stevið er so vánaligt, at við hetta lag, heldur hon ikki valskeiðið út, sigur hann**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*

– Við hetta lag heldur samgongan ikki valskeiðið út.

Kári Højgard, formaður í sjálvstýrisflokkinum hevur ringar vónir um framtíðina hjá samgonguni.

Hann sigur, at stevið er so vánaligt, at samgongan nærkast slitið fyri hvønn dag, sum gongur.

– Høvuðstrupulleikin er, at formenninir í teimum báðum stóru flokkunum hava ikki nóg gott tamarhald á sínum tingfólki og landsstýrisfólki og tað kemur ov ofta fyri, at einstakir politikarar brúka ymisk mál til at koma sær sjálvum fram í ljósið.

Tað, sum hann sipar til, eru afturvendandi og áhaldandi orrusturnar ímillum politikarar úr tjóðveldisflokkinum og fólkaflokkinum um ymisk mál, sum eru frammi.



*Bjarni Djurholm hevur ikki fingið undirtøku frá samgonguni til at leggja uppskotið um arbeiðsmarknaðin fram, sigur Kári Højgaard, formaður í sjálvstýrisflokkinu. Hann heldur, at framferðin hjá landsstýrismanninum í hesum máli hevur hevur óstortslig*

– Hesar ósemjur eru so slítandi, at hetta heldur samgongan ikki til, sigur hann.

Tað er annars ikki meiri enn fimm mánaðir síðani, at samgongan viðgjørdi júst tær innanhýsis ósemjurnar á stórum samgongufundi.

Tá hevði tjóðveldisflokkurin umhugsa støðuna til samgonguna í næstan 14 dagar, so tá stóð nógv á.

Men tað ferðina endaði tað við, at samgonguflokkar svóru hvørjum øðrum trygdareið uppá at taka betri partar fyri seg.

Nú skuldi tað halda uppat, at einstakir politikarar fóru at klandrast í fjølmiðlunum og nú skuldi tað vera, at tey ymsu málini skuldi viðgerast liðugt innanhýsis, áðrenn tey vórðu almannakunngjørd. Og tá ið tey so vórðu almannakunngjørd, skuldi samgongan standa sum ein maður um tey, øksl við øksl.

Samgongan varð samd um, at nú skuldi arbeiðsfriður verða, men dentur varð samstundis lagdur á, at hetta var seinasti kansur hjá samgonguni. Onkur segði enntá: Allar seinasti kansur. Men síðani hevur verið sama skilið.

– Stevið er ikki nógv batnað og síðani hava vit havt nógvar ógvusligar samanbrestir og eg dugi ikki at hugsa mær, hvussu samgongan kann halda valskeiðið út við hetta lag.

Hann leggur afturat, at hetta fullkomiliga beinir fyri trúvirðið hjá samgonguni og tað er eisini drepandi fyri tað politiska arbeiðið.

### Óstortsligt av Bjarna

Seinasta ósemjan hevur verið um uppskotið hjá Bjarna Djurholm um arbeiðsmarknaðin.

Men nú er greitt, at Bjarni Djurholm er púra einsamllur í samgonguni við uppskotinum

Tjóðveldisflokkurin hevur víst uppskotinum aftur og tað sama ger ein annar samgongufelagi, Jenis av Rana í Sosialinum í dag.

Og nú sigur eisini fjórði og seinasti samgonguflokkurin, sjálvstýrisflokkurin, at hann tekur heldur ikki undir við uppskotinum hjá Bjarna, soleiðis sum málið er lagt fram.

Sostatt er tað bara fólkaflokkurin, sum vil kennast við tað.

Kári Højgaard sigur, at tað er full semja um, at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum mugu broytast, tí hetta óskilið má halda uppat við longum verkføllum og at eini trý, fýra ymisk fakfeløg kunnu leggja eitt skip.

Tí hevur Bjarni Djurholm fulla undirtøku fyri at arbeiða við málinum.

– Men Bjarni Djurholm hevur ikki fingið politiska undirtøku í samgonguni fyri akkurát hesum uppskotinum.

Kortini legði hann tað fram fyri arbeiðsmarknaðin sum eini harraboð og tað var tað stóra mistakið.

– Bjarni legði uppskotið fram sum tað endaliga uppskotið hjá samgonguni og tað var óstortsligt og eg ivist ikki í, at hetta var orsøkin til tær hørðu ábreiðslurnar frá arbeiðsmarknaðinum.

– Tað sigur seg sjálvt, at slík uppskot mugu gerast í samráð við arbeiðsmarknaðin, tó at eg eisini má siga, at tað verður ikki arbeiðsmarknaðurin einsamallur, sum avgerð, hvussu økið skal skipast.

Kári Højgaard sigur, at tað er onki undarligt, at arbeiðsmarknaðurin er ørkymlaður, tá ið samgongan er so ósamd um málið.

– Og tað heldur onki undarligt, at arbeiðsmarknaðurin leggur seg púra tvøran, tá ið hetta verður lagt fram sum eitt endaligt uppskot, sum tey bara skulu gera viðmerkingar til.

– Tað er heilt greitt, at hetta málið má viðgerast í samráð við arbeiðsmarknaðin, men tað er onki at ivast í, at allir partar mugu svølgja, kamelar bæði politiskar flokkar og partar á arbeiðsmarknaðinum. Men at smoyggja nakað yvir høvdið á arbeiðsmarknaðinum, er nyttuleyst. Tí er framferðin hjá landsstýrismanninum ógvuliga óheppin, sigur formaðurin í sjálvstýrisflokkinum.

# Jenis tímdi ikki at svara Bjarna

**– Hevði Bjarni Djurholm hildið seg til mannagongdina, høvdu vit sloppið undan øllum rumblinum um uppskotini um arbeiðsmarknaðin, sigur Jenis av Rana, sum eisini er í samgonguni**

SAMGONGUSTEV
*Áki Bertholdsen*

– Bjarni Djurholm verður noyddur at taka uppskotið um arbeiðsmarknaðin aftur. Og tá ið málið verður tikið upp til nýggja viðgerð, eigur hann at halda seg til mannagongdirnar.

Jenis av Rana er formaður í Miðflokkinum, sum eisini er í samgongu. Og hann er ikki samdur við Bjarna Djurholm um uppskotini, um arbeiðsmarknaðin.

Sostatt tykist sum um Bjarni Djurholm verður meiri og meiri einsamallur við uppskotinum, hann hevur gjørt um ymisk viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, tí áður hevur tjóðveldisflokkurin hvassliga funnist at landsstýrismanninum fyri at leggja tey fram.



*– Bjarni Djurholm hevur ikki fylgt vanligari mannagongd og samgongan hevur ikki góðkent uppskotið, sum hann hevur lagt fram um arbeiðsmarknaðinum, sigur Jenis av Rana, formaður í miðflokkinum, sum eisini er í samgongu*

### Er ikki viðgjørt

Tjóðveldisflokkurin hevur víst á, at Bjarni Djurholm hevur ikki latið uppskotini fáa tað neyðugu, politisku viðgerðina, áðrenn hann legði tað fram.

Og tað er Jenis av Rana púra samdur í.

– Bjarni Djurholm hevur ikki fingið góðkenning frá samgonguni at leggja hetta uppskotið fram. Tað er rætt, at samgongan hevur biðið hann arbeiða við málinum, men uppskotið, sum hann hevur lagt fram, er als ikki viðgjørt í samgonguni.

Formaðurin í miðflokkinum sigur, at tí hevur Bjarni Djurholm ikki hildið seg til mannagongdina.

– Landsstýrismaðurin hevur sent flokkunum í samgonguni uppskotið. Men eg tímdi ikki at svara uppá tað, tí tað er burturspilt arbeiðiði og tað havi eg ikki stundir til.

Tað, sum Jenis av Rana sipar til, er, at Bjarni Djurholm átti at lagt tað ítøkiliga uppskotið fyri landsstýrið, men tað hevur hann ikki gjørt.

– Hevði hann gjørt tað, hevði hetta uppskotið verið steðgað longu tá.

Men tá ið Landsstýrið so hevur góðkent eitt uppskot, verður tað sent politisku flokkunum til viðmerkingar.

Men av tí, at uppskotið frá Bjarna Djurholm ikki er viðgjørt og góðkent í landsstýrinum, má tað metast sum um tað ikki er liðugt og eg tímdi heilt einfalt ikki at viðgera eitt uppskot, sum ikki er liðugt.

– Og um so var, at landsstýrið hevði góðkent akkurát hetta uppskotið, er tað ikki landsstýrið, sum skal samtykkja tað og tí má málið eisini leggjast fyri flokkarnar, fyri at vita, um undirtøka er fyri tí, men tað er tað ikki gjørt og tí átti tað ikki at verðið lagt fram.

### Má byrja av nýggjum

Jenis av Rana leggur eisini dent á, at landsstýrismaðurin hevur heldur ikki spurt partarnir á arbeiðsmarknaðinum, hvat teir halda um uppskotið, áðrenn tað varð lagt fram.

Tí má uppskotið hjá Bjarna Djurholm metast sum hansara egna uppskot til, hvussu viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum skulu skipast.

– Tí er tað burturspilt arbeiði hjá politisku flokkunum at viðgera tað. Vit taka ikki støðu til politisk mál á hasum støðinum. Men tá ið uppskotið hevur verið ígjøgnum alla myllluna, og hevur fingið að neyðugu viðgerina, bæði politiskt og hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, vilja vit fegin viðgera tað í flokkinum.

Jenis av Rana sigur, at tí hevur Landsstýrismaðurin vent málinum á høvdið og tí verður hann noyddur at byrja av nýggjum.

Hann sigur, at hevði hann fylgt mannagongdini, varð uppskotið langt síðani steðgðað og so høvdu vit sloppið undan ósemjuni í samgonguni.

Hann leggur afturat, at tí skilir hann eisini atfinningarnar hjá tjóðveldisflokkinum.

Hann dugir heldur ikki at síggja, hvussu tað skal bera til at seta uppskotið hjá Bjarna Djurholm í verk.

– Tað er alneyðugt, at hetta verður gjørt í samráð við arbeiðsmarknaðin. Tað ber ikki til at seta eitt uppskot í verk, sum stórir partar av arbeiðsmarknaðinum so avgjørdir eru í móti. Ætlanin við at broyta lógirnar á arbeiðsmarknaðinum er at skapar meiri frið. Men hesi uppskotini skapa enn størri ósemjur og tí ber ikki til at seta tað í verk.



# Landsstýrið blástemplaði lógaruppskot

**Í gerðabókini hjá landsstýrinum sæst, at Bjarni Djurholm fekk heimild frá landsstýrinum at gera uppskot til seming og gerðarætt og leggja tað fyri samgonguflokkarnar og partarnar á arbeiðsmarknaðinum til hoyringar**

GERÐARÆTTUR
*Ingi Rasmussen*

Enn einaferð er rok á arbeiðsmarknaðinum, og tað hevur flutt seg langt inn í samgonguna.

Tjóðveldisflokkurin hevst harðliga at Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, fyri hansara handfaring í málinum um seming og loysn á trætum á arbeiðsmarknaðinum. Bjarni Djurholm heldur seg hinvegin bara gera tað, sum er samtykt á landsstýrisfundi, har Tjóðveldisflokkurin hevur sitið við borðið.

Alt byrjaði, tá Bjarni Djurholm legði upprit um lóggávu á arbeiðsmarknaðarøkinum fyri landsstýrið. Tað var fyri seming og arbeiðsrætt. Harafturat skuldi hann gera uppskot um at seta bann fyri verkfalli, tá sjúkur vóru uppií.

Í Gerðabókini hjá landsstýrinum frá 10. juni verður sagt, at heitt varð á landsstýrismannin um at meta um, hvørt lógin um bann fyri verkfalli á alivirkjum í sambandi við sjúku eigur at vera sett í gildi. Síðani kemur orðingin, sum ivi er um:

»Heitt verður eisini á landsstýrismannin um at skriva uppskot um arbeiðsrætt og seming í somu lóg. Landsstýrismaðurin fekk undirtøku fyri at arbeiða víðari við málinum,« stendur í gerðabókini.

Høgni Hoydal tvíheldur um, at talan var bara um eina kunning, men Bjarni Djurholm vísir á, at málið varð umrøtt undir punktinum »lógaruppskot«. Sostatt er eingin ivi um, at talan var um, at hann skuldi gera eitt lógaruppskot, sigur Bjarni Djurholm.

Á landsstýrisfundi 24. juni er málið aftur á skránni. Bjarni Djurholm er ikki sjálvur á fundi, tí hann er uttanlands. Allir landsstýrismenn hjá Tjóðveldisflokkinum eru á fundi. Løgmaður leggur vegna Bjarna Djurholm tvey uppskot fyri arbeiðsmarknaðarøkið fyri landsstýrið.

Annað var um loysn av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum, og gerðabókin hevur hesa niðurstøðu frá fundinum:

»Fyrra lógaruppskotið fevndi um at skipa fastan gerðarætt og semingsmenn. Landsstýrið helt, at tað var skilagott, at hesar báðar skipanir vóru í einari lóg. Landsstýrismaðurin í vinnumálum fekk undirtøku fyri at senda uppskotini til løgtingslimirnar í samgonguni. Semja var samstundis um í samgonguni at kalla partarnar á arbeiðsmarknaðinum saman at viðgera uppskotið.«

Umsitingin sendi beinanvegin samgonguflokkunum uppskotini, og komin heimaftur úr útlondum, sendi Bjarni Djurholm pørtunum á arbeiðsmarknaðinum tað. Sostatt er í øllum førum líkt til, at landsstýrið hevur givið Bjarna Djurholm heimild at smíða lógaruppskot og at leggja tað fyri samgonguflokkunum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Síðan hevur tað víst seg, at samgongan als ikki var so samd kortini.

**Fakta**

**Úr gerðabók landsstýrisins:**

»Fyrra lógaruppskotið fevndi um at skipa fastan gerðarætt og semingsmenn. Landsstýrið helt, at tað var skilagott, at hesar báðar skipanir vóru í einari lóg. Landsstýrismaðurin í vinnumálum fekk undirtøku fyri at senda uppskotini til løgtingslimirnar í samgonguni. Semja var samstundis um í samgonguni at kalla partarnar á arbeiðsmarknaðinum saman at viðgera uppskotið.«

# Landsstýrismenn tosa ikki saman

**Tað er aftur rívandi galið við samstarvinum í landsstýrinum. Enn eitt opið stríð leikar í fjølmiðlunum, og orðini eru ikki mjúk, sum samstarvsfelagarnir brúka um hvønn annan. Politiski veruleikin er um at innheinta samgonguna, heldur Bjarni Djurholm, sum hevur skrivað eitt hvassorðað álop á Høgna Hoydal, varaløgmann.**



*Álvarsamar rivur eru komnar í samstarvið millum Bjarna Djurholm og Høgna Hoydal. Ivi er um, hvat landsstýrið hevur samtykt*

*Mynd: Jens K. Vang*

TAKT OG TÓNI
*Ingi Rasmussen*

Vinstra, høgra, vinstra, høgra. Tað er rætta lagið.

Tað er barnalærdómur í Føroyum, men hendan lóg geldur ikki føroyskan politikk.

Ólíku flokkarnir í Føroya landsstýri, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, sum liggja vinstru- og høgrumegin í politiska landslagnum, hava í øllum førum ómetaliga ilt við at finna eitt taktfast gongulag. Nú er aftur galið. Rívandi galið. Og hóast vit hvøppast við at skriva tað, so er enn einaferð talan um opið stríð í samgonguni. Hesaferð stendst rok av arbeiðsmarknaðarmálum.

Gevst at spæla solo, segði Høgni Hoydal í sínum eginleika sum varaløgmaður um vikuskifti við Bjarna Djurholm, landsstýrismann, sum umsitur arbeiðsmarknaðin. Nú svarar Bjarni Djurholm aftur í einum lesarabrævi, sum hann sjálvur hevur skrivað, og ger harvið greitt, at tað ikki eru fjølmiðlarnir, ið píska ein óndan stemning millum samgonguflokkarnar.

### Gjørt í brøkurnar

Tað eru ikki hissini orð, sum Bjarni Djurholm nú borðreiðir við afturímóti.

Høgni Hoydal er dumpaður sum varaløgmaður, skrivar hann millum annað. Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt í brøkurnar, sigur hann, og tí var neyðugt hjá Høgna Hoydal floksformanni at spinna rok og framleiða ein nýggjan sannleika.

Bjarni Djurholm kallar Høgna Hoydal pátiknan og sigur hann hava skapt eina mynd av sær sjálvum sum tann unga og góða; hini eru gomul og fordervað. Men hann hevur eingi avrik at vísa á, sigur Bjarni Djurholm speiskliga. At enda biður hann Høgna Hoydal koma til arbeiðis og í minsta lagi lata onnur fáa arbeiðsfrið, um hann ikki tímir.

Tað er lætt at ímynda sær, hvussu orðalagið man vera á einum landsstýrisfundi. Um nakað verður sagt yvirhøvur. Kanska er samgongan bara uppslitin. Ella kanska er alt ein sjónleikur fyri at markera sjónarmið og stjala yvirskriftir, sum formaður Javnaðarfloksins hevur ført fram.

### Hunddálkaður

Bjarni Djurholm viðgongur, at tað er eitt sindur pínligt, at samgongumenn kjakast í fjølmiðlunum, men hesaferð varð honum ovboðið.

– Eg føli meg so hunddálkaðan, at eg kundi ikki lata vera við at seta meg við telduna í gjár og skriva eina grein. Tað, sum Høgni Hoydal førdi fram um meg í Degi og viku fríggjakvøldið helt eg vera so persónligt, at tað kundi ikki fara aftur við borðinum. Eitt er, at vit eru ósamdir, men at eitt battarí av ákærum, sum eru so ósakligar, tað kann eg ikki liva við. Eg trúði ikki annað, enn at tað, sum vit arbeiða við, var í samljóði við tað, sum er samtykt í landsstýrinum , sigur Bjarni Djurholm.

### Sansar at

Sostatt er líkt til, at landsstýrismenn ikki otsa saman, men brúka pressuna til at senda heilsanir til hvønn annan. Spurdur, hví teir ikki ringja til hvønn annan, tá ivi stingur seg upp, sigur Bjarni Djurholm:

– Tað haldi eg, at tú skalt spyrja Høgna Hoydal um. Eg havi als ikki umrøtt hetta málið alment á hasum støðinum. Eg kann bara halda meg til tað, sum landsstýrið hevur samtykt, sigur Bjarni Djurholm.

Vit ætlaðu at spyrja Høgna Hoydal sama spurning, men hann var ikki at hitta. Tað hevur meira enn so leikað á áður, og fólk eru um at troyttast av vánaliga gongulagnum hjá landssins stýri.

Bjarni Djurholm viðgongur, at tað sansar at í løtuni, men hann heldur ikki, at samgongan er uppslitin.

– Eg trúgvi, at politiski gerandisdagurin treingir álvarsliga saman nú og gerst truplari, so hvørt fíggjarligu vánirnar gerast verri. Tað hevur helst politiskar frustratiónir við sær, og nú vit skulu loysa gerandismál, kemur tann ideologiski munurin millum flokkarnar til sjóndar. Eg skal viðganga, at tá tað snýr seg um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, so havi eg ikki altíð verið bylgjulongd við Høgna Hoydal, men í aðrar mátar hava vit ikki havt nakað útistandandi í so máta, sigur Bjarni Djurholm.

Spurningurin er so, um teir geva hvørjum øðrum ein kjans afturat.